# Húðrøkt úr Miðeystri

HÚÐRØKT
*Bergur Johannesen*
*bergur@sosialurin.fo*


*Miniralir og vitaminir úr botninum á Deyða havinum vera nýtt í húðrøktini frá Volare Føroyar*

Úr botninum á Deyðahavinum á húðina hjá føroyingum. Felagið Volare Føroyar, ið heldur til í Syðrugøtu, flytir inn og selur heilsugóðar vørur úr Ísrael. Við Maurensu Mohr á odda hevur Volare Føroyar virkað í tíggju ár. Felagið selur røktandi vørur, bæði í krem- og djús-formi. Vørurnar eru ríkar á vitaminir og mineralir, heili 26 ymiskar eru at finna. Serstakliga heilsugóða plantan Aloe Vera, ið í langa tíð hevur verið nýtt til ymiskar røktandi og lekjandi viðgerðir, er eitt av høvuðsevnunum í vørunum. Sera ríku mineralirnar úr Deyðahavinum verða somuleiðis nýttar til framleiðsluna.

### Til Føroya at kunna

Hjúnini Melomad, David, ið er uppfinnarin av hesi røktini, og kona hansara Zitti, eru í hesum døgum í Føroyum og kunna um hesar vørur. Tey eru úr Ísrael, og hann hevur heili 30 ár á baki innan hesa vísindina og er eisini triðja ættarlið av granskarum í familjuni. Við sær hevur hann bæði søgur og myndir av úrslitum, ið fólk hava upplivað eftir at hava nýtt hesa viðgerð. Húðsjúkur sum eksem og psoreasis hava verið viðgjørdar. Maruensa Mohr hevur samstarvað við hann øll hesi árini, har hon hevur umboðað hetta í Føroyum.

### Væl umtókt millum føroyingar

Umframt bara heilsugóðar vørur, umfatar úrvalið eisini vakurleikarøkt, tannrøkt og tílíkt. Viðgerðarhátturin er bæði við inntaki av djúsi og somuleiðis meiri vanligari húðrøkt, sum eittnú krem.

Vørurnar verða ikki einans seldar í Føroyum, men eisini í grannalondum okkara. Volare Føroyar samstarvar beinleiðis við framleiðaran, so talan er ikki um nakra handilsketu ella um millumlið.

Vørurnar eru væl umtóktar í Føroyum og marknaðurin er góður. Týdningarmikið er at fáa vørurnar fram, tí, sum Maurensa Mohr sjálv segði, - Tey, sum brúka tað – brúka tað aftur.

---

# Náttúruvinarligir bilar

**Støðugt hækkandi brennievnisprísirnir noyða vísindafólk kring allan heimin at kanna aðrar orkukeldur. El-bilurin er einki nýtt hugtak á heimsmarknaðinum, men heldur ókent er tað í Føroyum. SEV og felagið Sp/F Baldursbrá skipa 6. oktobur fyri kunnandi tiltaki í Norðurlandahúsinum, har júst hetta verður á skránni**

VARANDI ORKA
*Bergur Johannesen*
*bergur@sosialurin.fo*



*Náttúruvinarligu bilarnir tykjast at vera framtíðin innan ferðslumenning*

Í Danmark verður miðvíst arbeitt fram móti at skifta dálkandi akførini úr við náttúruvinarligar el-bilar. Í verandi løtu er granskingin komin fram til, at bilarnir megna í ein vissan mun at koyra við elorku, og partvíst við vanligum brennievni. Hetta merkir at motorurin slær til tá nógv orka skal til. Og í undanbrekkum løðir hann upp aftur.

Torben V. Holm, ið er projektleiðari hjá DONG í Danmark, verður við til tiltakið í Norðurlandahúsinum, og kemur at greiða frá, hvussu arbeitt verður við at menna loysnir og tøkni, sum kemur at stuðla skiftinum frá olju til el.

Sum flestum kunnugt er náttúrliga tilfeingið av olju avmarkað, og minkandi goymslurnar hava við sær ógvuligar príshækkingar. El-bilurin kann roknast sum framtíðar ferðsluhátturin, ið kemur at kollvelta dálkingartrupulleikarnar, ið heimurin stríðist við í dag.

### Løð bilin ístaðin fyri at fylla á

Fyri elfelagði SEV er tað av stórum týdningi at fylgja við menningini á júst teirra øki. Núverandi menning innan bilar sær út til at hava nýggj krøv til orkuframleiðararnar við sær. Um bilarnir verða settir til streym áløða á SEV tænastustøðum, um nøkur ár, liggur enn opið í kortum.

Áhugin hjá privat persónum á slíkum bilum er ymiskur, og avhongur, sum so nógv annað av peningaligum viðurskiftum. Verður grøn orka nýtt til at framleiða elið, ið er orkan hjá bilunum, kann væntast at ein nýggjur avgjaldspolitikkur verður at skoða. Týdningurin av at vera eitt »grønt land« er í vøkstri, í alheims høpi, og tí kann hugsast at hendan menning kemur at hava ávirkan á nógv øki.